## Hava ikki slept Ribéry

Sambært spanska Marca hevur Real Madrid enn ikki slept ætlanunum um at fáa hendur á Franck Ribéry. Bayern München hevur støðugt sagt, at teir ikki vilja selja spælaran, men nú hevur Real Madrid boðið teimum 425 milliónir fyri spælaran. Bayern München hevur júst keypt Arjen Robben úr Real Madrid, og tí verður mett, at spanska felagið í evstu løtu kann sleppa at brúka nakað afturat teimum 2,2 milliardunum, sum longu eru brúktar til spælarakeyp í summar.



## Anti fótbóltur hjá United

Arsenal-venjarin, Arsene Wenger, er alt annað enn fegin um fótbóltsspælið, sum Manchester United sýndi, tá Arsenal leygardagin tapti 2-1 móti Manchester United. – Eg havi sæð spælarar, sum fara á vøllin við tí fyri eyga at gera fríspørk. Í mínum eygum er hetta nógv verr enn at filma, so sum Eduardo gjørdi móti Celtic, sigur Wenger. Útsagnirnar verða tó ikki stuðlaðar av hatølunum, sum siga, at Arsenal leygardagin framdi 22 fríspørk og fekk seks gul kort, meðan United framdi 16 mfríspørk og fekk trý gul kort.

KÍ-AB 1-1 (0-0):

# KÍ spilti yvirtíðina



KÍ

AB

**Hóast KÍ fekk útjavnandi málið í evstu løtu og hevði brúk fyri at fáa eitt aftrat, fór øll yvirtíðin til spillis við kegli og fjákalótum, heldur enn at fáa bóltin í nánd av AB-málinum**




Hilmar Jan Hansen

Tá klaksvíkingar og norðoyingar annars lesa stigatalvuna í Vodafonedeildini eftir hetta 22. umfarið, er nakni veruleikin, at KÍ er niðast av teimum 10 liðunum. Við sínum sigri á B36 kom 07 Vestur ájavnt KÍ í stigum, men hevur eitt sindur betri málúrtøku og hevur latið KÍ aftasta plássið.

Tey flestu vildu hildið, at hetta er ein sera álvarslig støða, men ikki sá út til, at spælararnir hjá KÍ høvdu skilt, hvat stóð upp á spæl, tá dysturin ímóti AB í gjár nærkaðist endanum og enntá var farin út í fýra minuttir longu yvirtíðina.

Í næstsíðsta minutti hevði KÍ javnað til 1-1, eftir at Rúni Gaardbo púra róligur hevði dømt ársins klárasta brotsspark, tí bólturin kom í hondina á Stig-Roar Søbstad inni í AB-brotsteiginum. Atli Danielsen skjeyt og Tórður Thomsen bjargaði – men bólturin stakk útaftur til Atla, sum lættliga kundi skora í aðru atløgu.

Nú høvdu væl øll lið, sum høvdu verið í somu skóm sum KÍ, lagt alt fyri, so bólturin skjótast gjørligt kom inn í AB-brotsteigin – og allarhelst eisini í AB-málið. Og við fýra til fimm írestandi minuttum kundi saktans borið til at skapt ein, tveir ella kanska tríggjar málkjansir hesa seinastu løtuna. Men KÍ gjørdi bara ikki tað, sum onnur lið høvdu gjørt. Tvørturímóti!

### Kegl og fjákalótir

Í staðin gjørdist øll tann seinasta løtan ein long komedia – enntá eitt fitt petti inni á KÍ-hálvuni. Tað byrjaði við, at norski framherjin hjá AB, sum hevði havt ein dyst í dystinum við Høgna Madsen, gjørdi seg inn á Høgna, ið svaraði aftur. Tað seinna sá dómarin, og so var reyða kortið á lofti.

Har steðgaði tað bara ikki, tí løtu seinni gjørdist alt ein ruðuleiki, har summir lógu og aðrir stóðu. Klaksvíkingar og argjamenn skumpaðu hvønnannan, og tíðin bara gekk. Áðrenn nakar visti av, vóru næstan allir fýra minuttirnir av yvirtíðini farnir í kegli og fjákalótum, uttan at bólturin hevði verið stórvegis í spæli.

Tað kundu teir í AB fyri so vítt leggja líka í, tí teir høvdu – serliga í fyrra hálvleiki – víst seg at verið serstakliga glaðir fyri, at bólturin helst ikki var í spæli. Men teir í KÍ vóru væl við í hesum tíðardrepandi virksemi, ið spilti heimaliðnum allar møguleikar fyri at fáa meira burturúr enn bara 1-1, ið slett ikki var nøktandi fyri støðuna á stigatalvuni.

### KÍ vildi meira

Hetta var annars ein dystur, har tað fyri KÍ ráddi um at spæla fyri lívinum. Og í fyrra hálvleiki sá út til, at tað skiltu spælararnir. Kanska spurdust ikki teir stóru møguleikarnir burturúr, men KÍ royndi at leggja trýst á og hevði eitt hav av deyðbóltsstøðum, ið kundu gjørst vandamiklar, høvdu tær verið brúktar til fulnar.

Hinvegin vildi AB millum lítið og einki, og argjamenn gjørdu alt fyri at fáa tíðina at ganga. Teirra fyrri hálvleikur sá veruliga út, sum vóru teir komnir eftir einum stigi. Onkra hendinga ferðina royndu teir at fáa í lag mótálop, men fyrst og fremst var uppleggið at forða KÍ í at spæla. Og tað riggaði so frægt, at einki mál heldur kom fyri steðgin.

Tá so eitt mál kom góða 20 minuttir inn í seinna hálvleik, var tað AB, ið fekk tað. Mortan úr Hørg sendi eitt fríspark úr høgru síðu hegnisliga innfyri, har Tróndur Sigurðsson við aftaru stong fekk beint bóltin í málið. Gamaní, gjørdist tað við arminum, men tað tóktist hesa ferð meira tilvildarligt, enn tað plagar at vera, tá slík mál verða skorað ímóti KÍ í Klaksvík…

Tróndur fekk enn ein risastóran kjans nakað eftir málið, tá Rasmus Nielsen sendi bóltin væl innfyri og Tróndur gjørdist púra leysur við fremru stong. Men hann gjørdi sær ikki nóg stóran ómak við skallaranum, og í staðin kundi Jákup Mikkelsen bjarga KÍ frá at tapa 2-0.

**Henda myndin kundi verið tikin nær sum helst í yvirtíðini í Klaksvík, tí tað mesta av henni fór til kegl og fjákalótir**

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

## Als ikki nøktandi

Atli Danielsen var vónbrotin eftir dystin ímóti AB, sum á heimavølli bara gav KÍ eitt stig.

– Hetta var avgjørt ikki nøktandi hjá okkum. Eitt stig er altíð nakað, men vit høvdu veruliga brúk fyri øllum trimum stigunum, segði hann.

– Vit spældu serliga í fyrra hálvleiki væl, umframt at vit sæð yvir allan dystin høvdu bóltin meira og skaptu fleiri kjansir, so vit høvdu fult so væl uppiborið at vunnið.

Um brotssparkið, ið endaði við útjavnandi málinum, ásannaði Atli, at tað ikki var so væl skotið, tí tað var í góðari hædd hjá AB-málmanninum, Tórði Thomsen.

– Men tíbetur kom bólturin útaftur til mín, og so var bara at seta hann inn, segði Atli, ið hinvegin ikki var nøgdur við, at øll yvirtíðin eftir málið varð søplað burtur.

– Tað fór ein rúgva av tíð, og hasum høvdu vit ikki brúk fyri. Hatta var øgiliga óneyðugt.

*hil*

## Komu eftir einum stigi

Eftir dystin viðgekk annar av venjarunum hjá AB, John Petersen, at liðið fyrst og fremst var komið til Klaksvíkar eftir einum stigi.

– Sum dysturin háttaði seg, kundu vit tó iðra okkum um, at vit ikki fingu øll trý stigini. Vit fingu ímóti endanum eitt brotsspark ímóti okkum, og so bleiv tað ikki meira enn tað eina stigið kortini, staðfesti John.

Hann helt annars, at góða gongdin hjá AB eftir summarsteðgin hevur fleiri orsøkir:

– Vit hava fingið góða tilgongd, sum munar, men liðið sum heild arbeiðir eisini øgiliga væl saman. Teir ungu menninir vaksa við uppgávuni og trúgva upp á tað, segði John Petersen, ið ikki longur stúrir fyri niðurflytingini.

– Vit hava 12 stig niður til tey bæði niðastu liðini, og 15 stig eru eftir at spæla um, so nú haldi eg, at vit fara at hyggja meira uppeftir.

*hil*